

# FØROYAR Í ARKTIS

UTTANRÍKIS- OG MENTAMÁLARÁÐIÐ
Ministry of Foreign Affairs and Culture

# FØROYAR Í ARKTIS

Arktis broytist. Politiski og búskaparligi týdningurin, ið Arktis hevur í millumtjóða høpi, verður alsamt størri. Av tí sama verður arktiska økið og fólkini, ið her búgva, í størri mun enn fyrr, ávirkað av altjóða rákum.

Ein høvuðsorsøk er, at ávirkanin av veðurlagsbroytingunum týðiliga sæst í Arktis. Sum eitt arktiskt land, hava Føroyar, saman við hinum londunum í økinum, serliga ábyrgd av at tálma veðurlagsbroytingunum, og samstundis tryggja, at neyðugar tillagingar verða skipaðar á væl upplýstum grundarlagi. Tær broytingar, sum henda í arktiska økinum, raka eisini Føroyar. Neyðugt er tí, at Føroyar fáa ein arktiskan politikk, sum setir út í kortið, hvat føroyski leikluturin í Arktis skal vera, bæði í nærmastu framtíð og sum frá líður.

## ENDAMÁLIÐ VIÐ EINUM ARKTISKUM POLITIKKI ER:

> at skilmarka Føroyar sum samstarvspart í Arktis

> at styrkja leiklut Føroya í Arktiska ráðnum

> at fáa til vega grundarlag fyri avgerðum, ið eru við til at skapa menning, vitan og framburð í Føroyum og restini av Arktis.

Grundarlagið undir politikkinum eru fólkið og náttúran í Arktis. Búskaparliga og mentanarliga tilverugrundarlagið í Føroyum líkist tí hjá hinum arktisku londunum. Vit liva av náttúruni, serliga havinum. Styrkja vit tilverugrundarlagið hjá okkum, sum búgva í Arktis, styrkja vit mótstøðuførið í øllum arktiska økinum móti eitt nú veðurlagsbroytingum, búskaparligum sveiggjum og trygdarpolitiskum avbjóðingum. Tískil er fyrst og fremst neyðugt at viðurkenna, at menniskju, sum liva í og av Arktis, best eru før fyri at taka avgerðir um egna framtíð og menning.

Tað hevur týdning at síggja møguleikar í teimum avbjóðingum, sum standa fyri framman, og enn sum áður má burðardyggleiki vera stavnhaldið.

Arktiski politikkurin setir uttanríkispolitisku kós Føroya sum land í Arktis, og lýsir tey mál, sum Føroyar virka fyri at røkka í økisbundnum millumtjóða felagsskapum, eins væl og í breiðum altjóða høpi. Samstundis vísir politikkurin á átøk, ið Føroyar kunnu raðfesta og seta í verk fyri at røkka teimum málum, ið hava týdning fyri Arktis, og okkum, sum búgva í økinum.

## ÁTTA HØVUÐSMÁL MYNDA FØROYSKA POLITIKKIN Í ARKTIS:

> Trygd og støðufesti

> Millumtjóða samstarv

> Umhvørvi, náttúra og veðurlag

> Gransking, vitanarmenning og útbúgving

> Tilbúgving

> Tilfeingi í havinum

> Vinnumøguleikar og burðardygg menning

> Mentan og samfelag.

**Jenis av Rana**
landsstýrismaður í uttanríkismálum



## FØROYAR Í ARKTIS

- Føroyski landgrunnurin røkkur norður um pólkringin eins og fiskastovnar, sum Føroyar eiga lut í, ferðast um mørk norður móti Íshavinum. Sostatt kunnu Føroyar troyta tilfeingi og gera krøv, sum eru norðanfyri pólkringin.
- Føroyar hava verið virkin partur av arktiskum samstarvi, síðan tað byrjaði tíðliga í 1990unum – upprunaliga sum eitt umhvørvissamstarv. Í 1996 varð Arktiska ráðið sett á stovn, og har hava Føroyar virkað í sendinevnd saman við Danmark og Grønlandi. Síðan 2012 hevur sendinevndin havt heitið »Kingdom of Denmark«, men áðrenn vóru Føroyar nevndar við navni, saman við Danmark og Grønlandi. Í hesum høpi hava føroyskir myndugleikar, granskarar og onnur tikið virknan lut, umframt at Føroyar hava verið við til at undirskriva tríggjar sáttmálar millum londini í Arktiska ráðnum – tveir um tilbúgving og ein um gransking.
- Umframt Arktis sum landafrøðiligt øki, og tað samstarv, sum er skipað undir Arktiska ráðnum, er Arktis eisini áhugavert í breiðari heimspolitiskum samanhangi. Arktis er pallur fyri millumtjóða samstarvi á fleiri strategiskt týðandi økjum fyri Føroyar og umheimin. Tað tænir tí føroyskum áhugamálum at vera ein sjónligur og virkin partur í hesum samanhangi, og at taka lut í øðrum samstørvum fyri at ávirka og seta dám á menningina.




## HEIMSMÁLINI OG FØROYAR Í ALTJÓÐA HØPI

Heimsmálini fyri burðardygga menning eru ein natúrligur karmur um arktiska politikkin. Tey 17 málini, ið tilsamans eru ein framsøkin altjóða visjón fyri eina burðardyggari framtíð, samsvara væl við tær raðfestingar, tey virði og teir málsetningar, sum Føroyar virka fyri í altjóða høpi, eisini tá ið um ræður arktisk viðurskifti.

### SERLIGA VIÐKOMANDI FYRI FØROYAR Í ARKTIS ERU HESI HEIMSMÁL:

Nr. 7 um burðardygga orku

Nr. 8 um sømiligt arbeiði og búskaparvøkstur

Nr. 9 um vinnu, nýskapan og undirstøðukervi

Nr. 12 um ábyrgdarfulla nýtslu og framleiðslu

Nr. 13 um veðurlagsátøk

Nr. 14 um lívið í havinum

Nr. 15 um lív á landi

Nr. 16 um frið, rættvísi og sterkar stovnar

Nr. 17 um samstørv um heimsmálini.

# TRYGD OG STØÐUFESTI Í EINUM ÓVISSUM HEIMI

## Føroyar virka fyri, at Arktis framhaldandi verður trygt og støðufast.

Fólkaræði, mannarættindi og opinleiki eru treytaleys stavnhald Føroya í øllum millumtjóða høpi, eisini í Arktis. Samstarv millum londini skal vera grundað á altjóðarættarligar reglur og á sínámillum viðurkenning og virðing.

Aðalmálið um, at lágur spenningur skal vera millum londini í arktiska økinum, er undir trýsti eftir at Russland leyp á Ukraina 24. februar í 2022. Virksemið í Arktiska ráðnum er fyribils steðgað sum avleiðing av álopið Russlands á Ukraina.

At Finnland og Svøríki verða innlimað í NATO merkir, at nú verða øll londini í Arktis, uttan Russland, NATO-limalond. Tað letur upp fyri virðismiklum samstarvsmøguleikum millum tey sameindu, ið framvegis eiga at varðveita aðalmálið um lágan spenning.

Føroyar taka undir við átøkum, ið minka um sannlíkindini fyri misskiljingum, og átøkum, ið leggja upp fyri ótilætlaðum spenningsstøðum. Samstundis krevur broytta heimspolitiska støðan, at londini í Arktis grunda yvir og bera seg rætt at í sambandi við trygdarpolitisku óvissuna, nú atgerðir Russlands hótta støðufesti í økinum. Tað sæst millum annað í nýggju maritimu doktrini hjá Russlandi, har Arktis verður umrøtt sum eitt øki við avgerandi týdningi fyri trygd Russlands, og eitt øki við bæði búskaparligari og hernaðarligari millumtjóða kapping.

Tí kann roknast við øktum hernaðarligum virksemi, ið hevur verjuendamál – ikki álopsendamál – um okkara leiðir sum aftursvar frá NATO-londunum. Í hesum sambandi hevur tað týdning, at Føroyar eru við í tilgongdum og avgerðum, ið viðvíkja verjupolitiskum átøkum í Norðurhøvum.

Trygdar- og verjumál eru sambært heimastýrislógini felagsmál og kunnu sambært yvirtøkulógini ikki yvirtakast í verandi støðu. Tí er fortreytin gott samstarv við donsku stjórnina, NATO og hini NATO-limalondini í økinum.

Í nýggja strategiska skjalinum hjá NATO, sum er galdandi til 2030, eru Norðurhøv *(The High North)* fyri fyrstu ferð nevnt sum eitt fokusøki. Dentur verður í hesum sambandi lagdur á týdningin, ið siglingarfrælsi hevur fyri økið.

Fyri at trygd og støðufesti skulu valda, hevur tað stóran týdning, at Føroyar samskifta og eftir førimuni samstarva við hini sameindu í Arktis og í Norðuratlantshavi. Í hesum sambandi hevur USA ein serligan leiklut, men eisini Bretland, Kanada og hini norðurlondini hava týðandi leiklutir tá um trygdarpolitisku útlitini í økinum ræður.



16 FRIÐUR, RÆTTVÍSI OG STERKIR STOVNAR

# MILLUMTJÓÐA SAMSTARV Í ARKTISKUM HØPI

## Føroyar eru eitt vesturlendskt fólkaræði við rættartrygd og mannarættindum sum grundsúlum.

Føroyar eru eitt vesturlendskt fólkaræði við rættartrygd og mannarættindum sum grundsúlum. Tí virka Føroyar miðvíst fyri, at millumtjóða samstarv fer fram eftir skipaðum reglum og við støði í altjóða lóg. Tað tryggjar smærri londum betri møguleika at røkja síni áhugamál mótvegis stórum londum og stórveldum, sum eru valdsmiklari og virkisførari í heimspolitikki. Samstarv millum lond og altjóða samstarv eigur ikki bara at vera grundað á vald, men á sínámillum áhugamál og sínámillum viðurkenning. Hetta er ikki minst umráðandi, nú altjóða áhugin fyri Arktis økist.

Millumtjóða samstarv skipað í felagsskapum og samstarv millum lond er avgerandi neyðugt til tess at møta teimum mongu avbjóðingum, sum heimurin stendur fyri, bæði í Arktis og kring knøttin.

Skulu Føroyar kunna lyfta í felag við heimsins tjóðum, er tað ein fortreyt at luttaka í felagsskapum og samstarva við onnur lond. Í millumtjóða samstørvum finna vit samstundis pallar, har Føroyar kunnu gera sína ávirkan galdandi og bera fram egin áhugamál. Tey málsøkini, sum samstarvið í Arktiska ráðnum fevnir um, og sum onnur samstørv í Arktis fevna um, eru næstan øll yvirtikin, og Føroyar varða tí av flestu teirra. Talan er um øki, ið hava týdning fyri framhaldandi burðardygga menning í Føroyum og Arktis í síni heild. Tí virka Føroyar fyri at fáa eina sjálvstøðuga rødd í øllum viðkomandi samstørvum og felagsskapum.

### YMSU SAMSTØRVINI

Arktiska Ráðið er fremsta forum fyri millumtjóða samstarvi í Arktis. Limalondini virka saman við eygleiðarum og felagsskapum fyri at fremja samstarv í arktiskum høpi um millum annað umhvørvi og náttúru, umhvørvisvernd, veðurlag, burðardygga búskaparmenning og havsamstarv. Fleiri av málum Føroya í Arktis verða rokkin gjøgnum virkna og miðvísa luttøku í Arktiska ráðnum, har Føroyar eru í sendinevnd við Danmark og Grønlandi.

Arktiska ráðið hevur ikki heimild at samstarva um ella viðgera trygdarpolitikk. Álop Russlands á Ukraina hevur tó havt við sær, at steðgur er í virkseminum í Arktiska ráðnum.

Norðurlendska samstarvið hevur týdning í arktiskum høpi. Føroyar raðfesta norðurlendska samstarvið høgt og taka virknan lut á flest øllum økjum. Talan er um ein samstarvskarm við nógvum menningarmøguleikum, eisini í arktiskum høpi.

Útnorðursamstarvið millum Føroyar, Ísland og Grønland hevur eftir hondini mong ár á baki, og hevur ein serstakan leiklut, tá ið ræður um at styrkja samstarvið millum útnorðurlondini, og eyðmerkja áhugamál og avbjóðingar, ið londini hava í felag.

## SEKS ARBEIÐSBÓLKAR

**Samstarvið í Arktiska ráðnum fer í stóran mun fram í seks arbeiðsbólkum, sum skipa virksemið í samsvari við yvirlýsingar frá ráðharrafundum og arbeiðsskráir, sum semja er um.**

1. Arctic Monitoring and Assessment Programme (AMAP), sum ger vísindaligar metingar um umhvørvis- og veðurlags-spurningar í Arktis.
2. Arctic Contaminant Action Programme (ACAP), sum virkar fyri ítøkiligum átøkum móti dálking í Arktis.
3. Emergency Prevention and Preparedness and Response (EPPR), sum samstarvar um tilbúgving, leiting og bjarging.
4. Protection of the Arctic Marine Environment (PAME), sum fevnir um samstarv um havumumhvørvisvernd í arktiskum øki.
5. Conservation of Arctic Flora and Fauna (CAFF), sum samstarvar um lívmargfeldi í Arktis.
6. Sustainable Development Working Group (SDWG), ið virkar fyri burðardyggari búskapar-, mentanar-, umhvørvis og heilsumenning fyri tey, sum búgva í Arktis.

Havrættarsáttmáli Sameindu Tjóða er grundarlagið undir nøkrum av mest týðandi og fyri Føroyar strategiskt áhugaverd viðurskiftunum í altjóða høpi. Havrættarsáttmálin áleggur sáttmálapørtunum skyldur og rættindi, til dømis um marknaspurningar og løgdømi hjá strandarlondum, siglingarfrælsi, umhvørvi- og dálking, umframt náttúrutilfeingi í havinum og landgrunninum. Havrættarsáttmálin er sostatt eitt stýrandi amboð tá ið tað kemur til samstarv og menning í arktiskum høpi.

Millumtjóða samstarv um burðardygga umsiting av fiskastovnum í Norðurhøvum hevur hægstu raðfesting hjá Føroyum. Bæði í fleirliðaðum strandarlandasamráðingum, í tvíliðaðum sáttmálum og í felagsskapum, serliga NEAFC, hvørs sáttmálaøki røkkur til Norðpólin. Føroyar ynskja sjálvstøðugan limaskap í NEAFC.

Við støði í føroysku atlimaskapunum raðfesta Føroyar virkna luttøku í ST-stovnunum IMO, UNESCO og WHO. IMO ger reglur um trygd á sjónum, UNESCO er karmur um samstørv innan mentan, útbúgving og vísindi, sum stimbra trivnað og menning, og WHO hevur ein týðandi leiklut í málum, sum viðvíkja t.d. fólkaheilsu og farsóttarstýring.

Umframt virksemi í felagsskapum, hevur tað týdning, at Føroyar halda fram at styrkja viðurskiftini við hini londini í arktiska økinum serliga Noreg, Ísland, Grønland, Danmark, USA og Kanada. Eisini er umráðandi at halda fram at menna viðurskiftini við tey lond, sum vísa arktiska økinum ans. Millum annað Bretland, Skotland, Japan, Suðurkorea, Kina og limalondini í ES, umframt við ES sum felagsskap.



# UMHVØRVI, NÁTTÚRA OG VEÐURLAG

## Veðurlagsbroytingar eru álvarsamasta altjóða avbjóðingin í okkara tíð. Øll heimsins lond mugu standa saman um at møta hesi avbjóðing.

Veðurlagsbroytingar eru serliga eyðsýndar í arktiska økinum, har sót legst á kavaklødd landsløg, jøklar og ísfjøll. Jøklarnir tiðna alsamt skjótari og havið gerst heitari. Veðurlagsbroytingarnar, sum henda skjótari í arktiska økinum, ávirka fólk, livikor, lívmargfeldi, náttúru og umhvørvi, og fortreytirnar fyri at liva og virka í Arktis broytast. Umráðandi er tí fyri Føroyar framhaldandi at luttaka í granskingarsamstarvinum innan náttúru, umhvørvi og veðurlag, so vit eisini gerast betur før fyri at brynja okkara borgarar, vinnu og samfelag til at møta avbjóðingunum, sum standast av veðurlagsbroytingunum.

Føroyar samtyktu 5. mai 2022 ein nýggjan orku- og veðurlagspolitikk, sum hevur sett kósina á orku- og veðurlagsøkinum komandi 10 árini. Málið er, at útlátið av vakstrarhúsgassi skal minka við í minsta lagi 30 prosentum í mun til útlátið í 2010. Hetta merkir, at útlátið skal minka 50% frá 2020 til 2030 Minkingin skal fremjast við 23 átøkum komandi árini. Eitt tað virknasta átakið er at økja um elframleiðsluna úr varandi orkukeldum. Málið er, at í 2030 skal øll orkunýtsla á landi stava frá varandi orkukeldum. Elnetið í Føroyum er væl egnað at gera royndir við, ið m.a. hava til endamáls at optimera framleiðsluna úr varandi orkukeldum. Eisini kunnu Føroyar vera við til at menna best practice loysnir, sum kunnu brúkast í øðrum fjarskotnum og avbyrgdum samfeløgum í Arktiska økinum og aðrastaðni.

Onnur orku- og veðurlagspolitisk átøk skulu seta ferð á orkuskiftið innan upphiting, ferðslu og ídnað, so gingið verður burtur frá at brenna olju. Uppaftur onnur skulu verja vátlendi, tryggja eina burðadygga býarmenning o.a. Orku- og veðurlagspolitikkurin skal, saman við heimsmálunum hjá ST, síggjast aftur í okkara raðfestingum í millumtjóða samstarvi – eisini í arktiskum høpi.

Føroysk náttúru- og umhvørvisgransking á landi og sjógvi hevur í mong ár bygt eina holla vitan upp um náttúru-, umhvørvis- og veðurlagsviðurskifti í Føroyum og Arktis. Føroyar mugu framhaldandi raðfesta hesa gransking og vitanarmenning, tí vitanin er við til at kortleggja innihaldið og vavið í veðurlagsbroytingunum í okkara øki, hvussu skjótt tær henda og hvussu tær ávirka okkara livi- og vinnumøguleikar á landi og sjógvi. Eisini er henda vitan týðandi fyri, at vit í góðari tíð kunnu tillaga og brynja okkara samfelag til eina broytta framtíð.

*Føroysk umboð hava luttikið í arktiska umhvørvissamstarvinum undir Arktiska ráðnum, síðani tað byrjaði. Í dag er samstarvið í stóran mun skipað sum granskingarsamstarv har fakfólk frá føroyskum vitanarstovnum geva sítt íkast sambært strategiskari virkisætlan fram til 2030.*

**Hitin í arktiska økinum skal ikki økjast.**
Hetta hevur beinleiðis týdning fyri ísbræðingina í arktiska økinum, sum aftur ávirkar djóra- og plantulívið á landi og sjógvi víða um lond og høv. Føroyar ynskja at raðfesta veðurlagssamstarvið undir Arktiska ráðnum og at ávirka altjóða tilgongdir at koma fram á leið á veðurlagsøkinum. Luttikið verður miðvíst í arktiska, norðurlendska og altjóða veðurlagssamstarvinum.

Saman við hinum norðurlondum tóku Føroyar í 2020 eisini undir við norðurlendsku 'Visjón 2030' um, at norðurlond skulu vera heimsins burðardyggasta og mest samantvinnaða øki fram ímóti 2030. Ein týðandi partur er, at londini fylgja norðurlendsku yvirlýsingini um $CO_2$ neutralitet og seta framsøkin mál, sum eru í samsvari við París-avtaluna.

> Í mai 2022 samtykti Løgtingið nýggjan orku- og veðurlagspolitikk, ið hevur til endamáls at minka um útlátið av vakstrarhúsgassum við 30 prosentum í 2030 samanborið við 2010 og at skunda undir grøna orkuskiftið í Føroyum og. Orku- og veðurlagspolitikkurin inniheldur eina tíðarfesta virkisætlan við 25 ítøkiligum átøkum, ið skulu setast í verk næstu árini.

- **Náttúrumargfeldi í arktiska økinum skal hava góð livikor og vera vart móti oyðing av mannaávum.** Afturvendandi stovnsmetingar mugu halda fram og víðkast til annað livandi tilfeingi enn bara vinnulig fiskasløg og smáhval. Serliga viðkvom øki ella djóra- og plantusløg mugu fáa skipaða vernd eftir tørvi. Landsins vitanarberandi stovnar og fólk við staðbundnum kunnleika á náttúru- og umhvørvisøkinum á landi og sjógvi skulu taka lut í einum skipaðum átaki at útvega, savna og skipa eitt haldgott vitanargrundarlag um okkara náttúrumargfeldi á landi sum sjógvi. Á henda hátt ber til at víðka og menna vinnumøguleikarnar á burðardyggum grundarlagi og uttan at seta náttúrumargfeldi í váða.
- Náttúrumargfeldið verður eyðmerkt, lýst, skrásett, savnað og brúkt sum grundarlag undir fyrisitingarligum og politiskum avgerðum, sum loyva inntrivum á landi sum sjógvi.
- Náttúruvitanin verður brúkt sum týðandi íkast í umsitingini av okkara náttúrutilfeingi í heimligum, arktiskum, norðurlendskum og altjóða høpi.

**Útlátið av umhvørvisdálkandi og skaðiligum evnum skal minka,** millum annað evni við ozonoyðandi, upphópandi, hormonórógvandi ella øðrum negativum eginleikum fyri menniskju, djór, plantur og vistskipanir á landi og sjógvi. Skaðiligu evnini ferðast víða við hav- og luftstreymum kring knøttin og dálka umhvørvið í Arktis og í Føroyum. Avleiðingarnar av dálkingarevnunum síggjast aftur í djóra- og plantulívinum og í ávísan mun eisini fólkinum í Arktis. Eisini setur útlátið av sótbitlum ferð á niðurbræðingina av arktiska ísinum.

- Havið skal ikki verða køstur. Føroyska burturkastsskipanin verður dagførd í 2022-23, so alsamt meira verður endurnýtt í einum burðardyggum ringbúskapi. Føroyar vilja seta fokus á fiskiskap og annað virksemið á sjónum fyri at minka um dálkingina av havumhvørvinum.
- Eftirlit við dálkandi virksemi á landi og sjógvi skal raðfestast, og kanningarúrslit skulu verða alment atkomulig og brúkast breitt í umhvørvisverndarfyrisitingini og í viðkomandi millumtjóða samstørvum.

**Føroyar virka fyri,** at granskarar, fyrisitarar og leikfólk við serligum náttúru- og umhvørviskunnleika ganga saman at menna vitan um náttúru og umhvørvi. Eisini skulu hesi geva íkast til, og nema sær íblástur úr arktiska, norðurlendska og altjóða samstarvinum. Fakstovnar eiga at bjóða altjóða fakfólki og leikfólki við servitan fakligt samstarv í styttri og longri tíðarskeið, eisini tá ávísar rannsóknir ella verkætlanir verða fyriskipaðar. Eisini eiga fakstovnar at kveikja áhugan hjá almenninginum at taka lut í átøkum, sum økja um vitanina á náttúru- og umhvørvisøkinum.

- Fakstovnar eiga at skipa samstørv millum fakfólk og leikfólk fyri at betra og økja um vitanina á náttúru- og umhvørvisøkinum.
- Millum hesar stovnar eru Veðurstovan, Umhvørvisstovan, Havstovan, Jarðfeingi, Heilsufrøðiliga starvsstovan, Fróðskaparsetrið, umframt viðkomandi vinnufyritøkur.
- Tvørgangandi samstørv og rannsóknir eiga at verða raðfest, bæði í Føroyum og í millumtjóða høpi.





# GRANSKING, VITANAR-MENNING OG ÚTBÚGVING

## Gransking gongur aftur á flest øllum málsøkjum, sum hava við Arktis at gera, og er sostatt ein snúningsásur fyri føroyskan arktiskan politikk.

Hesin partur snýr seg í høvuðsheitum um karmarnar um gransking, vitanarmenning og útbúgving, meðan tað í hinum kapitlunum verður nortið við meira ítøkiligar málsetningar og raðfestingar á hvørjum øki sær.

Vitan, sum er grundað á gransking og vísindi, er ein avgerandi fortreyt fyri neyðugum avgerðum viðvíkjandi náttúru- og umhvørvi í Arktis og fyri at tryggja burðardygga menning, ið ger tað liviligt og skapar vøkstur í Arktis.

**Millumtjóða samstarv um gransking, vitanarmenning og útbúgving í arktiskum høpi og gransking um Arktis eigur at koma fólkinum í økinum til góðar.**

> Í 2017 skrivaðu Føroyar undir millumtjóða sáttmála undir Arktiska ráðnum um at styrkja granskingarsamstarvið í Arktis.

Føroyar hava í mong ár verið virknar í millumtjóða granskingarsamstørvum, sum viðvíkja Arktis. Nógv viðkomandi vitan og stórar dátumongdir eru tí í Føroyum, ið kunnu vera eitt virðismikið íkast til framhaldandi gransking og vitanarmenning í Arktis. Eitt nú á havøkinum, innan fólkaheilsu, og tá ið talan er um at máta mongdirnar av ávísum evnum í luft, sjógvi og djóra- og plantulívi.

**Føroyar vilja styrkja samstarvið og samskipanina millum granskingar- og vitanarstovnar í Føroyum og við viðkomandi útlendskar og altjóða granskingar- og vitanarstovnar.**

Á tann hátt vilja Føroyar gerast ein vitanardepil *(centre of excellence)*. Fyri at røkka hesum máli hevur týdning:

- At savna, skipa og regluliga dagføra upplýsingar um allar viðkomandi verkætlanir.
- At gera yvirlit yvir allar viðkomandi keldur og grunnar við granskingardátum í Føroyum. Mannagongdir, ið góðskutryggja dátur verða mentar, og dátuyvirvøka, dátuinnsavnan og dátuhandfaring verður greiðari skipað.
- At kunna um atkomumøguleikar og treytir fyri gransking, útbúgving og rannsóknum í Føroyum.

**Føroyar vilja luttaka í millumtjóða samstarvi um gransking og útbúgving og raðfesta granskingarverkætlanir, sum fremja samstarv millum granskarar í Føroyum og í øðrum londum.**

Ráðið fyri gransking, menning og nýskapan skal ráðgeva Føroya landsstýri og vinnuni um yvirskipaðan politikk og hugsjón, sum fevnir um gransking, menning og nýskapan. Ráðið skal seta mál fyri økini, bæði í Føroyum og í altjóða høpi, og ráðgeva um, hvussu gransking, menning og nýskapan kunnu gerast gagnlig fyri samfelagið, bæði í almenna og í privata geiranum.

**Ráðið hevur ein lyklaleiklut, tá ið Føroyar seta strategiskar raðfestingar á granskingarøkinum út í kortið, og arbeiðir fyri, at Føroyar eru ein virkin samstarvspartur í altjóða granskingarhøpi.**



Millum mongu økini innan gransking og vitanarmenning, sum Føroya virka fyri, eru:

- Havfrøði og lívtilfeingi í havinum
- Veðurfrøði
- Náttúruvísindi, t.d. lívfrøði og jarðfrøði
- Menning á økjum sum tøkni, samskifti og orku
- Avleiðingar av veðurlagsbroytingum
- Fólkaheilsa
- Samfelagsvísindi, t.d. innan búskap, arbeiðsmarknaðarviðurskifti, integrasjón og javnstøðu
- Hugvísindi, t.d. innan søgu, mentan, sálarfrøði og samleika.

Føroyar vilja taka virknan lut í útbúgvingarsamstarvi í arktiska økinum og útbúgva og førleikamenna fólk, sum kunnu virka fyri framhaldandi burðardyggari menning.

Føroyar skulu gera karmar, sum gera tað áhugavert hjá útlendskum granskarum og lesandi at koma til Føroyar at arbeiða, granska og lesa í styttri og longri tíðarskeið. í hesum sambandi hava vitanarstovnar ein týðandi leiklut.

## HAVSGRANSKING Á BREDDAN: HAVSINS ÁRATÍGGJU 2021-2030

»Havsins Áratíggju« er hugsjónin hjá altjóða Havnevndini IOC um at skapa felags karmar kring havvísindi, sum kunnu stuðla londum at røkka heimsmálunum fyri burðardygga menning.

**Sum stórhavstjóð og strandaland í arktiskum øki taka Føroyar undir við hugsjónini um Havsins Áratíggju og virka innan havvísindi fyri at tryggja eitt reint, burðardygt og mótstøðuført hav.** Føroyar skulu vera við til at framleiða nýggjar dátur, upplýsingar og vitan, sum eru neyðug fyri at røkka málsetningunum fyri Havsins Áratíggju.

## HAVSTREYMARNIR VIÐ FØROYAR AVGERANDI FYRI VISTSKIPANIR Í ARKTIS

Føroyar liggja soleiðis fyri, at umleið 90% av tí lýggja atlantiska sjónum, sum við Golfstreyminum rekur norðeystur og inn í arktis, rekur framvið okkum rekur framvið Føroyum, og víðari norðureftir. Harumframt rekur umleið 1/3 av tí kalda sjónum, sum fer úr Arktis, ígjøgnum tær djúpu gjáirnar í havbotninum sum liggja framvið Føroyum. Føroyar hava, síðani tíðliga í 1990 árunum mátað hydrografisku viðurskiftini, rákið og varmaflutningin inn í arktiska økið – umframt hydrografisk viðurskifti og rák av djúpum sjógvi, sum fer úr Arktis og víðari suðureftir. Rákið, ið hevur skiftandi hita og tøðevni við sær inn í atlantiska arktiska økið, hevur alstóran týdning fyri veðurlagið og havvistskipaninar har. Føroyar taka eisini aktivan lut í altjóða gransking av havklima í atlantiskum arktiskum sjógvi.

Føroyar og føroyingar granska somuleiðis í havvistskipanum í syðra partinum av atlantiska arktiska havøkinum. Hetta verður gjørt við kanningum bæði her heima og í altjóða samstarvi síðani 1990 árini. Harumframt taka Føroyar aktivan lut í altjóða gransking av vistskipanunum í hesum havøkinum í samstarvi við grannatjóðir okkara. Millum annað er stórur dentur lagdur á at kanna teir stóru ferðandi pelagisku stovnarnar: sild, svartkjaft og makrel, sum leita sær føði í Norðureystara Atlantshavi.

## HORIZON EUROPE

Føroyar og ES skrivaðu í 2022 undir nýggjan sáttmála, sum ber í sær, at Føroyar fáa atlimaskap og luttøku í evropeiska granskingarsamstarvinum »Horizon Europe« Umframt granskingarsamstarvi letur sáttmálin eisini upp fyri útbúgvingarsamstarvinum »Erasmus+« og mentanarsamstarvinum »Creative Europe«. Sum rammuskrá setir Horizon Europe tvørfakligar loysnir og altjóða samstarv í hásæti og virkar sum stuðulsskipan fyri fríari gransking, granskaraflytføri, strategiskari gransking og nýskapan.

Samstarv millum Føroyar og Evropasamveldið um gransking og menning er ein berandi súla undir leikluti Føroya í altjóða granskingarsamstørvum. ES hevur seinnu árini víst Arktis vaksandi ans, og tí er Horizon Europe ein umráðandi karmur fyri granskingar- og vitanarmenning í arktiskum høpi.

Gransking og menning hevur verið ein høvuðstáttur í samstarvinum millum Føroyar og ES, síðan Føroyar á fyrsta sinni í 2010 fingu atlimaskap í ES-samstarvstarvsætlanini.

# TILBÚGVING

## Lítil ivi er um, at skipaferðslan í Norðurhøvum og í Arktis fer at økjast í samsvari við, at ísur bráðnar og nýggjar siglingarleiðir lata seg upp.

Tað ber í sær nýggjar og størri møguleikar fyri fiskiveiðu, sjóflutningi, ferðavinnu á sjónum o.a. Útlit eru til, at fyritøkur í Føroyum kunnu gerast enn størri tænastuveitarar enn í dag, og at ferðslan millum oyggjarnar tí fer at økjast. Men harvið økist eisini vandin fyri óhappum, sum kunnu dálka reina og ríka havumhvørvið.

**Økta skipaferðslan í økinum fer at krevja økt millumtjóða samstarv um flog- og sjóbjarging, umframt tilbúgving í sambandi við umhvørvisdálking.** Víddin er stór, leiðirnar fjarskotnar og tilbúgvingartilfeingið avmarkað. Sterkasta tilbúgvingaramboðið eru upplýsing, fyribyrging og at seta teimum krøv, sum sigla og virka í okkara og Arktiska havøkinum.

Føroyar taka virknan lut í tilbúgvingarsamstarvinum. Saman við Grønlandi og Danmark hava vit umboðan bæði í »Emergency Prevention and Preparedness Response Working Group« og »Arctic Coast Guard Forum«, har tilbúgving og bjarging í Arktis eru í hásæti.

Altjóða avtalan um samstarv í samband við flog- og sjóbjargingarátøk í Arktis varð undirskrivað í 2011, og altjóða avtalan um samstarv í samband við dálkingarvanlukkur í Arktis varð undirskrivað í 2013.

**Føroyar virka fyri, at menna tilbúgvingina móti olju- og kemikaliudálking á sjónum.** Fyri at verja egin áhugamál – og arktisk áhugamál – eigur havumhvørvistilbúgvingin at raðfestast hægri. Hetta hava fakfólk, vinnurekandi og onnur í mong ár eftirlýst. Ein ávís tilbúgving er neyðug fortreyt fyri, at føroyskir myndugleikar kunnu luttaka í arktiska og norðurlendska tilbúgvingarsamstarvinum á jøvnum føti við hini londini. Arktiska og norðurlendska tilbúgvingarsamstarvið byggir á, at hvørt land hevur eina skipaða tilbúgving og ein tilbúgvingarbygnað, sum er førur fyri at ganga inn í eitt millumlanda



samstarv á verkligum átaksstigi og á tøkniligum tilrættaleggingarstigi.

> Tilbúgvingin móti olju- og kemikaliudálking verður raðfest.

> Landstilbúgvingin tekur virknan lut í arktiska og norðurlendska tilbúgvingarsamstarvinum og røkir áhugamál Føroya í arktisku MOSPA-avtaluni og norðurlendsku Keypmannahavn-avtaluni.

**Føroyar hava yvirtikið land- og sjókort-myndugleikan.** Sjókortini fyri føroyska sjóøki kunnu nú regluliga dagførast og við tíðini nágreinast eftir tørvi. Eitt nú kunnu tættari og neyvari dýpdarkurvur mátast upp nær landi, har dýpið minkar skjótt. Hetta betrar um siglingartrygdina og er eitt av mongum átøkum at fyribyrgja tilburðum og vanlukkum á sjónum. Eisini er ynskiligt, at kommunurnar alsamt dagføra nautiskar upplýsingar um inn- og útsigling úr havnum, havnaatlas og -tænastur, upplýsingar um loðs o.t., og at hetta verður dagført og fráboðað skipum og bátum, sum hava brúk fyri upplýsingunum.

> Skip og bátar skulu minnast á, at boða frá, um teir staðfestaósamsvar millum dátur í sjókortum og faktisk viðurskifti á staðnum, so sjókortmyndugleikin kann dagføra og rætta sjókortini.

> Føroyski sjókortmyndugleikin skal dagføra nautiskar upplýsingar av týdningi fyri siglingartrygdina og vísa á siglingarleiðir hjá skipum og bátum, sum koma og fara úr føroyskari havn.

Við neyvari veðurforsøgnum í føroyskum ábyrgdarøki, fær nýstovnaða veðurstovan eisini ein leiklut í mun til sigling í Norðurhøvum og máting og gransking av veðurlagnum.

**Føroyar ynskja,** at siglingarleiðir verða gjørdar til skip, omanfyri ávísa stødd, og skip, sum sigla við vandamiklum farmi, og sum ikki ætla sær í føroyska havn – og tí eins væl kunnu sigla framvið oyggjunum heldur enn millum oyggjarnar. Hetta er eitt av mongum átøkum at fyribyrgja vanlukkum í føroyskum sjóøki. Sjóvinnufelagsskapurin IMO kann eftir SOLAS-sáttmálanum, og eftir umsókn, góðkenna og staðfesta skipsrutur fyri at "betra um siglingartrygdina í samanrennandi økjum og í økjum við tættari skpaferðslu ella har rásarrúmið at stýra og manerera eru avmarkað av trongum plássi, siglingarforðingum, lítlum dýpi ella vánaligum veðri." Eisini kunnu umhvørvisatlit brúkast at skipa siglingarleiðir.

> Umsókn verður send IMO um ásettar siglingarleiðir kring Føroyar, so skip, sum ikki hava ørindi í føroyskari havn, verða beind uttanum oyggjarnar.

> Uppróppsskipan og AIS-eftirlit skal tryggja, at skipini fylgja staðfestum siglingarleiðum.

Føroyar taka undir við og virka fyri øktum millumtjóða samstarvi um trygd á sjónum í IMO (International Maritime Organi-sation), har Føroyar eru atlimur. Í 2017 kom sonevnda *Polar Code* hjá IMO í gildi. Talan er um eina røð av krøvum til bæði før og manningar, sum sigla og virka í póløkjunum. Síðan 2019 hevur IMO verið formligur eygleiðari í Arktiska ráðnum, og tað letur upp fyri beinleiðis samstarvs-møguleikum millum IMO og londini í Arktiska ráðnum.

**Føroyar virka fyri,** at eftirlitið við skipum verður styrkt so vit í enn størri mun fáa staðfest, hvørt skipini veruliga lúka føroysk og altjóða krøv til dálkandi útlát, trygd og lógligan fiski-skap. Afturat talgildum eftirlitsskipanum eiga eftirlitsvitjanir at verða gjørdar umborð á skipum, sum útinna virksemi sambært føroyskari lóggávu í altjóða sjógvi kring Føroyar, ella sum koma í føroyska havn.

> Talgilt eftirlit við skipanum, útláti og loyvum sambært altjóða og føroyskari lóggávu verður hert.

> Eftirlit umborð á skipum verður raðfest av Sjóvinnustýrinum og Vørn fyri at tryggja, at samsvar er millum fráboðað viðurskifti og veruligu viðurskiftini umborð.

# TILFEINGI Í HAVINUM

## Livandi havtilfeingi er ein meginsúla undir búskapinum í stórum pørtum av arktiska økinum. Fyri Føroyar hevur fiskivinna avgerandi búskaparligan og samfelagsligan týdning.

**Tí virka Føroyar fyri, at alt tilfeingi í havinum verður veitt á burðardyggum grundarlagi og gagnnýtt til fulnar.** Í millumtjóða høpi í Norðurhøvum eru Føroyar ein høvuðssamstarvspartur, tá ið um ræður fyrisitingina av nøkrum av heimsins størstu ferðandi fiskastovnum.

Í arktiskum høpi er fiskivinna karmur um talríkar møguleikar fyri burðurdyggum búskaparvøkstri og fyri samstørvum um gransking og vitan um havið og lívið í havinum. Millumtjóða fiskiveiðusamstarv eigur at skipa fiskiskap burðardygt, og samstundis tryggja, at neyðug atlit verða tikin til tess at verja sjálvt havumhvørvið og lívið í havinum.

**Føroyar samstarva tí munadygt til tess at forða fyri og at sleppa av við ólógligan, ófráboðaðan og óskipaðan fiskiskap.** Millum annað í NEAFC og NAFO.

Føroysk skip hava í mong áratíggju fiskað á nøkrum av norðastu leiðum í heiminum, og hesin fiskiskapur hevur havt stóran týdning fyri menningina av føroyska samfelagnum. Tí eiga Føroyar, við atliti at møguligum nýggjum fiskileiðum í Íshavinum, at vera ein savnandi og virkisfúsur samstarvspartur.

Í 2018 undirritaðu Føroyar, saman við ES, Grønlandi, Íslandi, Japan, Kanada, Kina, Noregi, Russlandi og USA millumtjóða sáttmálan um at forða fyri óskipaðum fiskiskapi í altjóða sjógvi í Íshavinum (eitt øki á umleið 2.8 mió. ferkilometrar). Sáttmálin er í fyrstu syftu galdandi í 16 ár. Sáttmálapartarnir samstarva um eina felags skrá fyri vísindaligt virksemi og eftirlit, og hesum arbeiði taka Føroyar virknan lut í. Henda tilgongd hevur týdning, um umstøðurnar við tíðini verða soleiðis, at farast kann undir skipaðan og burðardyggan fiskiskap í altjóða sjógvi í Íshavinum. Verða útlit fyri tí, átaka



Føroyar sær ein virknan leiklut at seta á stovn ein økisbundnan fiskiveiðufelagsskap at umsita fiskiskap í økinum ella virka fyri, at tílík umsiting verður løgd undir ein av longu virkandi fiskiveiðufelagsskapunum, Føroyar eru partur av.

- Føroyar hava ein greiðan og virknan lut í millumtjóðasamskifti um at umsita møguligan fiskiskap í Íshavinum, soleiðis at nýggj rættindi kunnu tryggjast á bestan hátt og soleiðis, at møgulig framtíðarveiða verður bæði vísindaliga og burðardygt grundað í.
- Føroyar raðfesta at fylgja arbeiðinum hjá ICES á arktiska økinum og at virka fyri framtíðar virksemi í Íshavinum, um hetta kann gerast innan fyri karmin á sáttmálanum um at forða fyri óskipaðum fiskiskapi í altjóða sjógvi í Íshavinum.

Sum sjálvstøðugt strandarland fiska Føroyar í dag ferðandi fiskastovnar. Við teimum broytingum, sum eru í havinum, kunnu hesir flyta seg til Íshavið í framtíðini. Tí halda Føroyar fast í at varðveita tað sjálvræðið, sum Føroyar hava - bæði tá ið umræður strandarlanda-samráðingar og ferðandi fiskastovnar. Somuleiðis vilja vit virja fyri rættindunum at fylgja hesum fiskastovnum, um teir flyta seg.

- Føroyar raðfesta rannsóknir í arktiska økinum, herundir í Íshavinum, og virka fyri at byggja upp serfrøði og vitan, sum er viðkomandi fyri virksemið í Arktis.
- Føroyar viðurkenna rættindi hjá øðrum at gagnnýta sítt tilfeingi, og Føroyar virka fyri at finna varandi semjur millum strandarlond um hvussu felags fiskastovnar í Norðurhøvum skulu umsitast.

Føroyar mugu áhaldandi standa við rættin at troyta livandi tilfeingi í sjóøkinum við Svaldbard. Hesin rættur er staðfestur í Svaldbards-sáttmálanum frá 1920, ið millum annað snýr seg um tær treytir, sum Noreg hevur móti hinum sáttmálapørtunum.

Í øllum londum í Arktis verða havsúgdjór veidd. Føroyingar drepa grind og annan smáhval, og hava veitt hval síðani landnám. Grind er ein týðandi partur av føroysku matmentanini, og hvalaveiðan gevur eitt virðismikið matvøruíkast til húsarhald í Føroyum.

Støða Føroya er, at tað er skynsamt búskaparliga, umhvørvisliga og tá ið umræður matvørutrygd at veiða hval og varðveita hesar førleikarnar. Spik og tvøst frá hvali eru stuttfluttur matur við lágari kolevnisslóð.

Føroyar leggja stóra áherðslu á, at veiða og umsiting av hvalastovnum í Norðurhøvum skal vera burðardygg. Føroyar stovnaðu saman við Noreg, Íslandi og Grønlandi »North Atlantic Marine Mammal Commission« (NAMMCO) í 1992. NAMMCO veitir stjórnunum í limalondunum vísindaliga ráðgeving um umsiting og veiðu av havsúgdjórum, og Føroyar raðfesta luttøkuna í NAMMCO samstarvinum. NAMMCO hevur eygleiðarastøðu í Arktiska ráðnum.

# VINNUMØGULEIKAR OG BURÐARDYGG MENNING

Fortreytin fyri dynamiskum og góðum livikorum í Arktis eru fjølbroyttir vinnumøguleikar og størv, ið fáa fólk at flyta til og støðast.

**Nú arktiska økið broytist, hevur tað týdning at umseta avbjóðingar til møguleikar.** Hetta hevur føroyskt vinnulív, sum virkar um allan heim og er framsøkið, nýskapandi og mennandi, drúgvar og góðar royndir við. Bæði, tá ið talan er um at menna serstakar staðbundnar loysnir til viðurskiftini í einum oyggjalandi, og tá ið talan er um at laga serføroyskar loysnir til eftirspurning á heimsmarknaðinum. Neyðugt er at stimbra útlendskar íløgur í staðbundnar loysnir, ið framhaldandi tryggja burðardygga menning og vøkstur.

## FERÐAVINNA

Føroyar ynskja at samstarva um burðadygga ferðavinnumenning í Arktis. Føroyar, Grønland og Ísland hava í mong ár,, samstarvað um at stuðla undir ferðavinnumenningina í hesum stóra arktiska økinum í sonevnda NATA-felagsskapinum. Við nýggju siglingaleiðunum og munandi betri møguleikum fyri loftferðslu í Arktis, er grundarlag fyri enn størri vøkstri í ferðavinnuni.

Kappingin millum lond, flogvallir og havnabýir kann skjótt seta ferðavinnuna undir trýst. Arktis er eitt dýrt og avbjóðandi øki at ferðast til, og skal menningin verða bæði umhvørvisliga, búskaparliga og sosialt burðardygg, er umráðandi, at samstarv, avtalur og javnbjóðis karmar í Arktis tryggja eitt høgt støði í øllum liðum.

Umráðandi er í hesum sambandi eisini at seta ferðavinnuni krøv og at skapa karmar so at ferðavinnan verður eitt burðardygt og jaligt ískoyti til búskaparligu menningina og umdømi hjá Arktis sum ferðmál.

Vinnuferðavinna kann gerast eitt týðandi íkast til samlaðu ferðavinnuna í Føroyum.

## ALING

Vit gerast alsamt fleiri fólk í heiminum, og stjórnir, granskarar og vinnan um allan knøttin, leita eftir nýggjum burðardyggum loysnum at tryggja øllum mat í munnin. **Í havinum eru sera stórir ótroyttir møguleikar fyri at ala fisk og tara til matna, og at gagnnýta tað, ið ikki verður brúkt beinleiðis til matna, til proteinir og aðrar hágóðsku úrdráttir.**

Føroysku laksaalifyritøkurnar eru í heimsflokki og hava í fleiri ár skarað framúr við bestu úrtøku á marknaðinum og lítlum felli. **Føroysku royndirnar kunnu eisini vera góðar hjá øðrum londum, sum eru farin undir at menna sína alivinnu.**

Føroysku taraalifyritøkurnar eru somuleiðis í fremstu røð. Enn er taraaling lutfalsliga nýggj vinnugrein, men úrslitini higartil vekja ans kring allan heim. Innan gransking, menning og *best practice loysnir* kann slóðbrótandi taraalingin í Føroyum ganga á odda at víðka um eina nýskapandi vinnu í Arktis. Reini sjógvurin í Arktis veitir trygd fyri bestu dygd. **Taravinnan er í vøkstri, og bæði Føroyar og Arktis sum heild, hava góðar fyritreytir fyri at gerast ein vinnu- og vitanardepil fyri taraaling og at ganga undan í at virðisøkja taravørur.**

## GRANSKING, MENNING OG NÝSKAPAN

Samstarvið millum granskaraumhvørvið og alivinnuna hevur sera stóran týdning fyri at gagnnýta mongu møguleikarnar í alivinnuni. Serliga viðkomandi er P/F Fiskaaling, ið hevur sum aðalmál at skapa vitan til varandi aling. Hetta er ein visjón um framhaldandi burðadygga menning í alivinnuni. Við fullari virðing fyri vistskipanini í firðunum og í havinum, og við atliti til aðrar vinnur og

samfelagið sum heild, ber til at fáa munandi størri, og varandi, úrtøku úr alivinnuni.

Føroyska vinnan og føroyska granskingar- og nýskapanarumhvørvið kunnu í felag leggja væl afturat arktiska samstarvinum um aling, og yvirhøvur vitanini um, hvussu vit best kunnu gagnnýta havið burðardygt. **Saman við vinnuni kunnu stovnar og samstørv sum Fiskaaling, Havstovan, Umhvørvisstovan, Heilsufrøðiliga Starvsstovan, Deildin fyri arbeiðis- og almannaheilsu og iNOVA í felag bjóða Føroyar fram, í Arktis og fyri heiminum øllum, sum ein vitanardepil fyri burðadyggan vøkstur úr havinum.**

## ÚTGERÐ TIL FISKI- OG ALIVINNU

Føroyskar fyritøkur framleiða framkomna útgerð, sum verður nýtt um allan knøttin bæði í sjóvinnuni, fiskivinnuni og alivinnuni. Fyritøkurnar hava megnað at laga seg skjótt til broytt og herd krøv, og framleiða tól og útgerð í heimsflokki, bæði tá ið talan er um trollemmar, trol, alinótir, aliringar og hátøkni til at stýra tólum í framleiðslu og flutningi.

## BYGGING

Nakrar føroyskar fyritøkur hava royndir við at átaka sær byggiverkætlanir í Arktis. Royndirnar við at arbeiða í harða veðurlagnum í Føroyum, og vælútbúna og smidliga føroyska arbeiðsmegin, hóska væl til avbjóðingarnar í Arktis. Hetta er eitt vinnuøki, ið føroyskar fyritøkur við fyrimuni í størri mun kundu troytt, um tørvur skuldi verið á tí.

## KST

Vinnumenning krevur í dag førleikar innan kunningar- og samskiftistøkni á hægsta støði. Fremsta tilfeingið í KST vinnuni eru vitan, hugflog og royndir, og tað hevur tí alt at siga fyri hesar vinnur, at vit hava eina undirvísingarskipan, sum í øllum liðum og á øllum stigum, er í fremstu røð.

Føroyska KST vinnan tekur virknan lut í menningini av Talgildu Føroyum, sum gevur føroyskum borgarum og vinnuni atgongd til eina røð av almennum og privatum tænastum.

Føroyskar fjarskiftisloysnir hava í mong ár verið veittar til bæði skip og frálandavinnu. **Føroyar hava tí bæði royndir og ítøkiligar loysnir at bjóða øðrum, smáum og fjarskotnum samfeløgum og vinnuøkjum, innan bæði tøkniliga samfelagsmenning og fjarskifti.**

Fylgissveina- og rúmdartøkni fáa alsamt vaksandi týdning, og í arktiskum høpi kann rúmdar- og fylgissveinatøkni fáa ein umráðandi leiklut á fleiri mótum. Millum annað innan talgilding, eftirlit og gransking. Frá føroyskari síðu verður fylgt við í hesi gongd, og samstarvsmøguleikar eiga at verða eyðmerktir.

**Føroyar vilja virka fyri øktum samstarvi í Arktis, so vit í felag kunnu menna KST førleikarnar í økinum og skapa best møguligar karmar fyri íverksetarar og fyri vøkstur í KST-vinnunum.**

> Skúlanet er ein felags rakstrar- og tænastuskipan, ið skal menna og reka eitt vælvirkandi og trygt kt-net fyri alt undirvísingarverkið í Føroyum.
>
> Skúlanet skal loysa samansettu kt-uppgávurnar fyri undirvísingarstovnarnar, og við vælvirkandi og tryggum kt-kervi gera tað lættari at samstarva. Lyklaorð eru trygd, synergi, standardisering og fyrimunir við stórrakstri.

## SHIPPING

Føroyar hava í dag ein rættiliga fjølbroyttan handilsflota, shippingfeløg og manningar, sum arbeiða um allan knøttin, umframt góðar heildartænastur til sjóvinnuna. Føroyska altjóða skipaskráin hevur ment seg til eina viðurkenda og kappingarføra skipaskrá, og nógvar fortreytir eru sostatt í lagi, til at Føroyar kunnu bjóða seg fram sum arktisk tænastu- og havnamiðstøð fyri sjóvinnu.

BURÐARDYGT
VINNULÍV

Burðardygt Vinnulív er ein felagsskapur við tólv føroyskum fyritøkum, sum hevur til endamáls at menna burðardyggar mannagongdir við serligum atliti at trimum ítøkiligum avbjóðingum: veðurlags-broytingum, heilsustøðuni í havinum og tapi av lívfrøðiligum margfeldi. Gjøgnum samstarv roynir felagsskapurin at gera sítt til at vera við í ST -málunum fyri burðardyggari menning (SDG 13 Veðurlagsátøk, SDG 14 Lív í havi og SDG 15 Lív á landi) skjótari og við størri ávirkan, enn fyritøkurnar høvdu megnað hvør í sínum lagi.

Í januar 2021 settu fyritøkurnar sær fyri at arbeiða saman í minsta lagi trý ár til tess at menna eitt strategiskt háttalag, ið eyðmerkir vágarnar og møguleikarnar, sum standast av hesum avbjóðingum.

**FIMM HØVUÐSENDAMÁL ERU VIÐ SAMSTARVINUM:**

1 at gerast klókari og dugnaligari,

2 at menna burðardyggar mannagongdir gjøgnum eina strategiska langtíðarætlan,

3 at samstarva,

4 at taka lut og

5 at hugkveikja onnur til eisini at raðfesta hesi stevnumið.

Vakstrarforum

Vakstrarforum fór til verka í februar 2021. Endamálið við Vakstrarforum var at birta upp undir virðisøking í týdningarmiklum geirum, siðbundnum vinnum og alternativum framtíðarvinnum í Føroyum á burðardyggari grund.

Umframt løgmann og viðkomandi lands-stýrismenn sótu fólk við servitan úr ymiskum vinnugreinum, arbeiðsmarknaði, gransking, íverksetan, orku og burðardygd í Vakstrar-forum.

Nú Vakstrarforum er liðugt við arbeiðið, hevur tað latið seks frágreiðingar úr hondum. Hesar snúgva seg um havið, KT, vinnuferða-vinnu, maritimu veitaravinnuna, útbúgving og arbeiðsmarknað og einar grønari Føroyar. Tær seks frágreiðingarnar innihalda til-samans 164 ítøkilig tilmæli um burðardygg vakstrarátøk í Føroyum.



# MENTAN OG SAMFELAG

## Mentan hevur stóran týdning fyri sterka samleikan og samfelagsmenningina í Arktis.

Fólkatalið í økinum er alsamt vaksandi, og ein sterk mentanarlig tilvitska og samstørv um mentan eru við til at tryggja hesa gongd. **Mentan, mentanararvur, list og skapandi vinnur eiga tí at fáa høga raðfesting í arktiskum høpi.**

Í yvirlýsing frá norðurlendsku mentamálaráðharrunum frá november 2021 verður víst á, at list og mentan eru grundarlag fyri burðardyggari menning og týðandi liður í arbeiðinum at fremja altjóða umhvørvis- og veðurlagssamstarv. Eisini í UNESCO verður víst á, at mentan er grundarlag undir burðardyggari samfelagsmenning.

Mentan hevur stóran týdning fyri samfelagsmenningina í Arktis. Fólkatalið í økinum er alsamt vaksandi, og ein sterk mentanarlig tilvitska og samstørv um mentan eru við til at tryggja hesa gongd. Bókasøvn, søvn og skjalasøvn eru týðandi stovnar, ið eru við til at føra víðari og tryggja vitan og burðardygga menning í Arktis. Stovnarnir eru týðandi vitanargrunnar fyri gransking og miðlan av felags náttúru- og mentanararvinum í Arktis. Aðrir mentanarstovnar so sum tónleika- og sjónleikahús og ikki minst norðurlendsku mentanarhúsini eru við til at skapa trivnað og tilknýti til Arktis. Eitt virkið mentanarliv og frítíðarliv er ein fortreyt fyri tí góða lívinum í Arktis.

Tað viðvirkar til at stimbra samstørv á øðrum økjum, at lond hava eina felags fatan av tí týdningi, ið mentan og list í breiðum høpi hava fyri eitt vælvirkandi fólkaræði. Útbúgving og skiftisskipanir í útbúgvingarhøpi heilt frá barnaskúla til universitetsstig hava ein serligan leiklut í hesum høpi.

Í yvirlýsing frá norðurlendsku mentamálaráðharrunum frá november 2021 verður víst á, at list og mentan eru grundarlag fyri burðardyggari menning og týðandi liður í arbeiðinum at fremja altjóða umhvørvis- og veðurlagssamstarv.

**Føroyar virka miðvíst fyri at gerast partur av evropeiska mentanarsamstarvinum Creative Europe.**

Eisini spurningurin um sosiala burðardygd er viðkomandi, tá ið um ræður Arktis. Tað er ein sannroynd, at avleiðingar av veðurlagsbroytingum – og átøk, ið hava til endamáls at tálma veðurlagsbroytingum – kunnu hava eina sosiala slagsíðu, ið atlit skal takast at.



## 17 málsetningar

- Føroyar virka fyri, at Arktis framhaldandi verður trygt og støðufast.
- Arktiska ráðið er fremsta forum fyri millumtjóða samstarv í Arktis.
- Havrættarsáttmáli Sameindu Tjóða er grundarlagið undir nøkrum av mest týðandi og fyri Føroyar strategiskt áhugaverd viðurskiftunum í altjóða høpi. Havrættarsáttmáli Sameindu Tjóða er stýrandi amboð Føroya fyri samstarvi og menning í Arktis.
- Hitin í arktiska økinum skal ikki økjast.
- Náttúrumargfeldi skal hava góðar umstøður og vera vart móti oyðing av mannaávum.
- Útlátið av umhvørvisdálkandi og skaðiligum evnum skal minka.
- Millumtjóða samstarv um gransking, vitanarmenning og útbúgving í arktiskum høpi eigur at koma fólkinum í økinum til góðar.
- Føroyar vilja styrkja samstarvið millum granskingar- og vitanarstovnar í Føroyum og við viðkomandi útlendskar granskingar- og vitanarstovnar.
- Føroyar skulu vera við til at framleiða nýggjar dátur, upplýsingar og vitan, sum eru neyðug fyri at røkka málsetningunum fyri Havsins Áratíggju.
- Føroyar virka fyri, at menna tilbúgvingina móti olju- og kemikaliudálking á sjónum.
- Føroyar virka fyri, at alt tilfeingi í havinum verður veitt á burðardyggum grundarlagi og gagnnýtt til fulnar.
- Føroyar samstarva munadygt til tess at forða fyri og at sleppa av við ólógligan, ófráboðaðan og óskipaðan fiskiskap.
- Føroyar raðfesta rannsóknir í arktiska økinum, herundir í Íshavinum, og virka fyri at menna viðkomandi serfrøði og vitan.
- Vinnulív hevur ein týðandi leiklut at umseta avbjóðing til møguleikar, ið framhaldandi tryggja burðardygga menning.
- Føroyar skulu halda fram at vera undangonguland innan aling á sjónum, bæði av fiski, tara og øðrum.
- Føroyar vilja virka fyri øktum samstarvi í Arktis, ið hevur til endamáls at menna KST førleikarnar í økinum og skapa best møguligar karmar fyri íverksetarar og fyri vøkstri í KST-vinnunum.
- Mentan, mentanararvur, list og skapandi vinnur eiga tí at fáa høga raðfesting í arktiskum høpi.